## Alarmsentralurin ringir til brandstøðina

Nú tað er staðfest, at sløkkiliðið ikki hevur ábyrgd av at kava eftir fólki, sum eru farin á sjógv, er viðkomandi at spyrja, hvørjum alarmsentralurin boðar frá, tá ið boð til dømis koma um ein bil við fólki í, sum er farin á sjógv.

Á politistøðini í Havn verður upplýst, at ringt verður beinan vegin til brandstøðina, tí teir hava útgerð og froskmenn. Hetta merkir altso, at hóast sløkkiliðið ikki hevur skyldu til at kava eftir fólki, so er tað teir, ið verða boðsendir, um til dømis ein bilur fer á sjógv.

**tn**

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður:

# - Eingin ætlan um kavaraábyrgd

**Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, ið hevur ábyrgd av allari tilbúgving í Føroyum, sigur, at tað ikki er nøkur beinleiðis ætlan um, hvar ábyrgdin av kaving í sambandi við bjarging skal liggja. Tó sigur Bjørn Kalsø, at arbeitt verður við allari tilbúgving í løtuni**

TILBÚGVING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í sambandi við at tað í gjár í blaðnum kom alment fram, at eingin kavaratilbúgving er í Føroyum, hava vit vent okkum til Bjørn Kalsø, sum er avvarðandi landsstýrismaður fyri allari tilbúgving her í Føroyum, at vita, um hann sum landsstýrismaður kann liva við, at eingin hevur skyldu til at bjarga fólki, sum til dømis eru farin á sjógv í einum bili.



*Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, hevur ábyrgdina av allari tilbúgving í Føroyum. Hann sigur, at ongar beinleiðis ætlanir eru um kavaraábyrgd í løtuni*
*savnsmynd*

### Ógvuliga kompliserað øki

- Hetta er eitt øki, sum er ógvuliga kompliserað, og tað er mær vitandi heldur ikki løgfrøðisliga dagført. Í flestu førum siga vit, at tilbúgvingarskipanin byggir á lokala ábyrgd, men í hesum førinum er tað ikki grett, um ábyrgdin er lokal, sigur Bjørn Kalsø, sum tó vísir á, at í sambandi við havumhvørvislógvina hava kommurnar ábyrgdina, um oljudálking er inni á vágni.

- Hetta er eitt veldugt øki, sum verður tikið upp. Tað stendur í samgonguskjalinum, at alt tað, sum eitur tilbúgving, skal takast upp, og tað verður arbeitt við tilbúgving í breiðari høpi í løtuni, sigur landsstýrismaðurin.

Bjørn Kalsø sigur, at um vit hyggja eftir, hvussu støðan er aðrastaðnis, so er greitt, at økið er kompliserað, og at tað krevur nógva útgerð, útbúgving og fólk.

Landsstýrismaðurin vísir á, at onkrar kommunur hava sjálvbodnar kavarar og útgerð, men tær eru fáar í tali, og at Fiskiveiðieftirlitið hevur útbúnar kavarar og útgerð. Trupulleikin er tó tann, at tað er avmarkað, hvussu skjótt teir kunnu verða á staðnum, tá ið ein ólukka hendir, sigur hann.

### Kavaravakt er ógvuliga kostnaðarmikil

- Um vit skulu hava lokala kavaravakt, so er greitt, at tað er ógvuliga kostnaðarmikið, og spurningurin er eisini, um fólki er til tað, sigur Bjørn Kalsø.

- Hetta er tó eitt øki, sum man er noyddust at hyggja uppá, og vit noyðast at meta um, hvussu frægast er at loysa tað, sigur landsstýrismaðurin.

Sum áðurnevnt verður arbeitt við allari tilbúgving sum heild í løtuni, men ongar beinleiðis ætlanir eru um, hvar ábyrgdin av kaving í sambandi við bjarging skal liggja, sigur Bjørn Kalsø at enda.

# Verður tikið upp beinanvegin

**Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, heldur tað verða sera álvarsligt, um froskmenn hjá sløkkiliðnum ikki kenna seg tryggar við útgerðina, sum sløkkiliðið hevur. Hann ætlar sær tí at taka málið upp sum skjótast**

TILBÚGVING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, sigur, at um froskmenn hjá sløkkiliðnum ikki kenna seg tryggar við útgerðina, so eigur málið at verða tikið upp beinanvegin*
*savnsmynd*

Sum vit skrivaðu í blaðnum í gjár, so hevur onkur froskmaður hjá sløkkiliðnum í Havn nokta fyri at kava meira, tí at hann kennir seg ikki tryggan við tí útgerð, sum Tórshavnar Sløkkilið hevur.

### Fleiri søgdu nei

Tá ið ein manntómur bilur fór á sjógv í Havn leygardagin, skuldu froskmenn á sjógv at vissa sær, at einki fólk var í, men sum skilst søgdu fleiri av froskmonnunum nei til at kava, tí teir ikki kendu seg tryggar við útgerðina. Tveir fóru tó á sjógv, og annar teirra kom eitt sindur illa fyri, tá ið maskan hjá honum fór av, og hann fekk fitt av sjógvi í seg.

Fleiri av froskmonnunum hjá sløkkiliðnum, sum Sosialurin hevur tosað við, vilja verða við, at talan var bert um enn eitt dømi um vánaliga útgerð.

Brandmeistarin í Havn, Kartni Jacobsen, sigur, at útgerðin er í lagi, men ein av froskmonnunum, sum stóð á bryggjuni leygardagin, boðaði seinni sama dag leiðsluni á brandstøðini frá, at hann kavar ikki meira, sum vit eisini umrøddu í gjár.

Heðin Mortensen, borgarstjóri, er skelkaður av tíðindunum um, at froskmenn ikki kenna seg tryggar við útgerðina. Hann er í løtuni staddur uttanlands, men kemur heim aftur seinni í vikuni.

- Hetta er eitt mál, sum má takast upp beinan vegin. Um menn eru ótryggir við útgerðina, so skilji eg væl, at teir ikki vilja kava. Her má okkurt gerast, og tí ætli eg mær at taka málið upp saman við brandmeistaranum, so skjótt sum eg komi heim aftur, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin nevnir í hesum sambandi, at tað kanska hevði verið eitt hugskot at fingi fakfólk, ið ikki eru knýtt at sløkkiliðnum, at kanna útgerðina og gera av, um hon er nøktandi.